# Starvs- og persónsprofilur

## Leiðari fyri Kunningarstovuna á Tvøroyri



Tvøroyrar kommuna apríl 2019

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 3
1. Um starvið ........ 4
Fokusøki í starvinum ........ 4
Løn ........ 5
2. Ábyrgd og førleikakrøv ........ 6
Ábyrgd ........ 6
Førleikakrøv ........ 7
Fakligur førleiki ........ 7
Leiðsluførleiki og persónligir eginleikar ........ 7
3. Setanartilgongd ........ 8
Tíðarætlan ........ 8
Umsókn ........ 8
Samband og upplýsingar ........ 8

## Inngangur

Síðani ábyrgdin av innlendis ferðavinnumenning varð løgd kommununum í 2015, eru leiklutir í og kommunala fokusið á ferðavinnu broytt nógv. Fleiri kommunur síggja í dag ferðavinnu sum ein týðandi vinnumøguleika.

Hetta setir øðrvísi krøv til kunningarstovurnar, sum flyta seg frá at vera ein kunningardiskur hjá borgarum og vitjandi, til eisini at taka ein meira virknan lut í at menna ferðavinnuna og seta nýggjar dagsskráir fyri marknaðin.

Samstundis sum kunningarstovurnar framvegis eru lokala snúningspunktið fyri borgarum, handils- og vinnulívi á staðnum, skulu tær nú eisini í størri mun leita upp nýggjar marknaðir, menna aktørar, marknaðarføra og positionera kommununa í mun til sentralu marknaðarføringina hjá Visit Faroe Islands.

# 1. Um starvið

Kunningarstovan á Tvøroyri heldur til mitt í býnum saman við býráðsskrivstovuni.

Leiðarin fyri Kunningarstovuni vísir bygnaðarliga til kommunustjóran.

Starvið er fulla tíð. Starvstíðin byrjar skjótast til ber.

Leiðarin er einasta starvsfólk á Kunningarstovuni, men kann, í sambandi við ítøkiligar uppgávur, brúka aðrar partar av kommunuumsitingini. Leiðarin má tí tola skiftandi arbeiðstíðir og at taka eyka tøk, tá virksemið krevur tað.

Uppgávurnar hjá kunningarstovuni eru í høvuðsheitum at menna, kunna um og marknaðarføra ferðavinnuna í Tvøroyri kommunu, og saman við øðrum aktørum gera Tvøroyri sjónligt í ferðavinnuhøpi.

## Fokusøki í starvinum

Kunningarstovan hevur ein týðandi leiklut at menna og upplýsa um ferðavinnumøguleikar í kommununi.

Kunningarstovan skal tí vera í tøttum sambandi við ferðavinnuaktørar, mentanar- handils- og vinnulívið á staðnum; og megna at síggja og vísa á marknaðarmøguleikar, seta dagsskrá fyri økið, kveikja og menna verandi og nýggja møguleikar fyri ferðavinnu.

Nýggi leiðarin fær møguleikan at seta sín dám á og hava ávirkan á ferðavinnumenningina í økinum. Ferðavinnan er í stórum vøkstri, her er tí eisini ein serstakur møguleiki at vera við til at byggja eina spennandi vinnu upp og seta Tvøroyri á altjóða ferðavinnukortið.

Ein spennandi og umráðandi uppgáva er at samskipa tiltøk fyri kommununa, til dømis mentanarnáttin og jólatiltøk. Hetta verður á hvørjum ári gjørt eftir avtalu millum Kunningarstovuna og kommununa

Sum natúrligt snúningspunktið fyri virksemi í økinum, skal Kunningarstovan støðugt fylgja við í, hvat er at uppliva og njóta, at hava sjóneykuna á menningarmguleikum og á ymiskum miðlum upplýsa um hetta og gera kommununa sjónliga.

Kunningarstovan hevur bert atgongd til avmarkað starvsfólkatilfeingi. Leiðarin skal tí sjálv/ur duga at skifta ímillum uppgávur av ymiskum slag og hava neyðuga fatan av, hvussu hesar best verða loystar við tí tilfeingi, sum er, m.a. við at:

- Ganga undan við kveikjandi og stimbrandi hugburði og vera tilvitað/ur um sín týðandi leiklut at røkka málum.
- Menna og betra arbeiðsgongdir á ein slíkan hátt, at sum best og mest fæst burtur úr starvsfólkaliga og fíggjarliga tilfeinginum
- Støðugt menna Kunningarstovuna við at fremja og tryggja eitt gott og virkið arbeiðslag millum Kunningarstovuna, aðrar partar av kommunuumsitingini og vinnulívið.

## Løn

Starvið sum leiðari fyri Kunningarstovuni verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag, so sum Akademikarafelag Føroya ella Starvsmannafelagið.

# 2. Ábyrgd og førleikakrøv

## Ábyrgd

Leiðarin fyri Kunningarstovuni hevur mótvegis kommunustjóranum ábyrgd av Kunningarstovuni.

Leiðarin hevur ábyrgdina av at upplýsa og marknaðarføra økið soleiðis:

- Við skipaðum skráum kunna borgarar og vitjandi um, hvat fer fram í økinum av almennum áhuga.
- Kunna um og marknaðarføra Tvøroyri, bæði innan- og uttanlands. Tað merkir at leita upp marknaðir og sambond, at framleiða tilfar um Tvøroyri  í hóskandi formi til viðkomandi miðlar – og hugsa hetta inn í marknaðarføringina hjá Visit Faroe Islands
- Samstundis tryggja Tvøroyri ein sjálvstøðugan leiklut, og at skapa eina sjálvstøðuga ímynd av Tvøroyri í sambandi við marknaðarføringina hjá Visit Faroe Islands.
- Tryggja, at ferðafólk lættliga fáa kunning um trygd og um, hvussu tey skulu bera seg at í náttúruni

Leiðarin hevur ábyrgdina av at menna økið soleiðis:

- Fyrireika veitarar í økinum til uppgávuna við kunnandi og mennandi átøkum
- Skapa sær eina mynd av kundum og veitingarmegi í økinum, og fylgja við menningini og deila sína vitan við lokalu aktørarnar og geva kommununi upplýsingar um, hvørjum kørmum og tænastum tørvur er á í økinum
- Fylgja við lokalu aktørunum, kenna teirra áhugamál, tørv og førleikar, og bæði hjálpa teimum at gagnnýta sínar verandi møguleikar og síggja nýggjar.
- Støðugt menna tænastustøðið, eitt nú við skeiðsvirksemi og mennandi tiltøkum
- Fyrireika komandi ferðavinnuár saman við veitarum og handilslívi
- Eftirmeta ferðavinnuárið við veitarar, handilslívi og borgarar eina ferð um árið
- Framleiða hagtøl um málbólkar, og um ynskir og nøgdsemi hjá ferðafólkum

Leiðarin hevur ábyrgdina av at ráðleggja og samskipa økið soleiðis:

- Ráðleggja saman við aktørum í økinum, og soleiðis skapa neyðugu undirtøkuna og samanhangin í virksemi, ætlanum og væntanum í økinum
- Eftir fastari avtalu við kommununa samskipa tiltøk í kommununi, td mentanarnáttina.
- Skapa felags visjón fyri økið, seta mál við støði í umstøðunum í økinum og tørvi hjá aktørunum, og leggja ætlanir fyri at røkka málunum og støðugt fylgja við og skapa sær vitan um bæði nyttu av og nøgdsemi um tey úrslit, ið verða rokkin
- Støðugt tryggjar sær, at Kunningarstovan hevur førleikarnar (ella atgongd til teir), ið skulu til at røkka teimum málum, sum verða ráðløgd og røkja tær uppgávur, ið skulu til.

## Førleikakrøv

Umsøkjarar verða mettir eftir fakligum og persónligum førleikum; og skulu hava sum flestar av niðanfyri standandi eginleikum:

### Fakligur førleiki

- Viðkomandi útbúgving og royndir við ferðavinnu og ferðavinnumenning
- Dugir at samskifta, upplýsa og marknaðarføra á viðkomandi miðlum

### Leiðsluførleiki og persónligir eginleikar

- Er góður liðleiðari, sum kveikir til gott og jaligt samstarv
- Megnar at seta dagsskrá og torir og evnar at taka avgerðir
- Megnar at veksla ímillum at hava yvirskipaða tilgongd og at síggja smálutir í heildini
- Er sjónliga eldhuga/-ur og tryggjar greið mál og krøv um úrslit
- Dugir at arbeiða strategiskt og halda framlítandi fokus
- Er slóðbrótandi og dugir at eggja til nýhugsan
- Dugir at virka við fíggjarligum skili og effektivari nýtslu av tilfeingi
- Hevur góð evni at samskifta og at fáa boðskapin fram í viðkomandi miðlum
- Dámar tætt, skipað og opið samskifti og samstarv við ymiskar aktørar í vinnuni, aðrar partar av kommununi, borgarar og onnur viðkomandi

## 3. Setanartilgongd

Setanartilgongdin verður skipað við einum samrøðuumfari.

Ein setanarnevnd velur nakrar umsøkjarar til eina samrøðu. Teir umsøkjarar, ið verða valdir til samrøðu, skulu møguliga taka eina test við denti á leiðslueginleikum, ið ráðgevingarfyritøka skipar fyri. Um testir verða nýttar, fáa umsøkjararnir høvi til at gjøgnumganga úrslitini frá testini og meta um tey saman við ráðgevingarfyritøkni, áðrenn tey verða brúkt sum partur av grundarlagnum undir samrøðuni.

Setanarbólkurin metir um umsøkjararnar og ger tilmæli um setan. Grundarlagið undir tilmælinum er umsóknin, samrøðan, harímillum upplýsingar frá samrøðuni, og persónliga medferðin undir henni, og møguliga úrslitini og viðgerðin av leiðslutestini. Tvøroyri býráð setir starvið.

### Tíðarætlan

Starvið er lýst leyst í føroyskum miðlum, og á heimasíðuni hjá Tvøroyri kommunu.

Umsóknir til starvið skulu vera Tvøroyri kommunu í hendi í seinasta lagi 16. Mai 2019 kl. 12.00.

### Umsókn

Umsóknir við CV og viðkomandi prógvum skulu sendast til teldupostadressu: commit@commit.fo, Viðmerk: “Leiðari fyri Kunningarstovuna” á umsóknina.

### Samband og upplýsingar

Áhugaðir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Jónleyg J. Bech, kommunustjóra, á tlf. 286885 ella CommIT á tlf 285010 ella um teldupostadressu:  commit@commit.fo